# við blýantinum




17 Skemt bøkur og hálvtriðjatúsund tekningar er tað vorðið til, nú Óli P. skjótt rundar tey sjeyti. Men enn hevur speiski teknarin ognar ætlanir at gevast at hvessa sær blýantin




og átti fyri langari tíð síðani at fingið onkra sjálvkritiska klokku at ringt. Tað vandamikla við slíkum søgum, sum so at siga eru farnar at liva sítt egna fjølmiðlalív, er, at ongin setur spurnartekin við tær longur. Tað ger tað ikki minni átroðkandi at finna ein nýggjan vinkul, men tá kann tað vera nærum ógjørligt at raka á ein hátt, so fólk rakna við.

## Persónliga fingramerkið

Men ber tað yvirhøvur til at fáa fólk at rakna við av eini tekning longur? Teldutøknin og ógvusligi tíðindafloymurin hevur jú langt síðani gjørt skakandi myndatilfar til ein part av okkara gerandisdegi

- Nettupp, og tí hevur tað ongantíð verið meir brúk fyri persónligu viðmerkingini. Mongdin av upplýsingum ger ikki fólk klókari, um øll bara siga tað sama, ella kappast um, hvør kann sjokera mest. Tað verða fólk bara dul av til endan. Tað skal eitt øðrvísi bit til, og har meini eg veruliga, at tann satiriska blaðtekningin hevur ein serstakan eginleika at snara tingunum so mikið, at fólk fara at hugsa øðrvísi, kanska heilt av nýggjum, sigur Óli.

At tað ber til, hava júst tekningarnar hjá Óla sjálvum prógvað best. Stutt eftir at Óli var byrjaður sum blaðteknari á Sosialinum, tók stóra kreppan fyrst í nítiárunum dik á seg. Búskaparligu hóttafallini lurdu á hvørjum horni, og døpru søgurnar í fjølmiðlunum tóktust ongan enda at fáa.

- Kreppan gjørdist ironiskt nokk mítt hepni. Samstundis sum skipasmiðjan, har eg starvaðist, lat aftur, lat Sosialurin upp fyri stóru avbjóðingini hjá mær sum blaðteknara. Stemningurin millum fólk var næstan ikki til at halda út. Alt var svart/hvítt – fyri tað mesta bara kolasvart, og tað sá veruliga ikki út til at vera nakað eftir at flenna eftir. So eg leyp bara út í tað við eitt sindur av enn svartari humor, sum eg billi mær inn loysti eitt sindur upp á onkran hátt.

Óli ásannar, at beint nú sær framtíðin hjá blaðtekningini ikki so bjørt út. Nógv bendir á, at blaðteknarar eru eitt tað fyrsta, sum verður spart burtur á eitt nú donsku bløðunum, sum heldur velja at brúka myndir og grafikk av ymsum slagi. Sjálvur trýr Óli allíkavæl, at tað væl kann hugsast, at blaðtekningin fær eina renesansu um ikki so langa tíð. Á øllum øðrum økjum síggja vit, at fólk leita aftur til tað sermerkta, tað sum víkir frá, og hetta væntar Óli eisini kann koma blaðtekningini til góðar.

Spurdur, hvørji góð ráð hann hevur at geva einum møguligum ungum blaðteknara, ivast Óli ikki.

- Fylg væl við og tak ímóti øllum hugskotum, men kopiera ongantíð. Onkursvegna má ein blaðteknari altíð gera hugskotið til sítt egna, seta sítt persónliga fingramerki á tað, tí tað er har frá, allar komandi tekningar skulu koma. Megnar hann ikki tað, er best at gevast, meðan tíð er.



Høvdingar hittast